## ES hartar Ísrael

Evropasamveldið fordømir framferðina hjá ísraelsku fregnartænastuni Mossad, sum brúkti følsk evropeisk pass, tá ísraelskir agentar myrdu ein Hamas-leiðara á einum hotelli í Dubai í síðsta mánaði. Menninir, sum framdu morðið, høvdu følsk pass úr Bretlandi, Írlandi, Fraklandi og Týsklandi, og tað hevur elvt til vreiði og misnøgd í teimum fýra londunum. Ísraelsku myndugleikarnir gera vanliga ikki nakrar viðmerkingar til tíðindi um fregnartænastuna Mossad, og tað hava teir heldur ikki gjørt hesdaferð.



## Styðja argentinar

Ríkis- og stjórnarleiðararnir í londunum í Suðurameriku og í Karibiska Havinum siga í einari felags fráboðan, at teir taka av fullum huga undir við Argentina og tess stríði við Bretland um rættindini til Falklandsoyggjarnar. Í 1982 var kríggj millum tey bæði londini, eftir at argentinski herurin hevði hersett tær. Nú hava bretsku myndugleikarnir loyvt einum bretskum oljufelagi at leita eftir olju nærhendis oyggjunum, og tað hevur fingið øði í argentinar. Teir hava ongantíð slept kravinum um ognarrættin til Falklandsoyggjarnar ella Malvinurnar, sum argentinar rópa oyggjarnar.



*Hóast meiri er landað av toski og hýsu higartil í ár, eru samlaðu nøgdirnar av botnfiski minkaðar. Kortini er avreiðingarvirðið vaksið við 14%*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Meiri av toski og hýsu í ár

**Hagtøl vísa nú tað, sum flestu høvdu væntað. Meiri av toski er komið upp á land í ár enn í fjør, og sama er galdandi fyri hýsu. Haraftrat er avreiðingarvirðið munandi betri í ár enn í fjør**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrstu hagtølini yvir føroysku ísfiskaveiðina higartil í ár vísa, at nakað meiri av toski er komið upp á land í ár enn somu tíð í fjør. Sama er við hýsu, sum eisini er vaksin nakað í nøgd.

Hagstova Føroya veit í morgun at siga, at 1.262 tons av toski eru landað um avreiðingarskipanina í januar í ár móti 1.099 tonsum í januar í fjør. Hetta er ein munur upp á 163 tons.

Men tað er ikki bara í januar í ár, at nøgdin av toski, sum verður veidd undir Føroyum og landað um avreiðingarskipanina, hevur verið veksandi.

Eisini teir seinastu mánaðirnar av farna ári, var nøgdin av toski veksandi í mun til árið fyri.

### Meiri hýsa

Hagstova Føroya sigur, at avreidda nøgdin av hýsu eisini er vaksin nakað í ár í mun til somu tíð í fjør.

Í januar í fjør vórðu tilsamans 509 tons av hýsu landað um avreiðingarskipanina í mun til 567 tons í ár. Hetta er ein munur upp á 58 tons.

Hagstova Føroya hevur talt saman nøgdina av botnfiski í januar í ár í mun til í januar í fjør.

Samanlagt er talan um eina minking í nøgd upp á 6%, men samstundis er avreiðingarvirðið í januar í ár vaksið við 14 prosentum í mun til sama mánaða árið fyri.

Tað merkir, at fiskaprísirnir hava verið betri higartil í ár enn um somu tíð í fjør.

# Sløk vika á Toftum

**Hendan vikan fer neyvan at roynast nakað serligt hjá landarunum á Toftum. Væntandi er ikki, at nøkur landing verður aftur fyrr enn hósdagin ella fríggjadagin í hesi vikuni**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Menn hjá landingarmiðstøðini landa skip*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hetta verður eftir øllum at døma ein heldur sløk vika hjá landarunum á Toftum.

Niclas Davidsen, landingarformaður, sigur seg ikki vænta nakran bát aftur fyrr enn hósdagin ella fríggjadagin.

Hann sigur, at fleiri skip vóru inni í síðstu viku, og tey eru framvegis til fiskiskap.

Niclas Davidsen væntar, at trolbátarnir Hansa Maria og Búgvin koma inn at landa hósdagin ella fríggjadagin - og fríggjadagin hava eisini línuskipini Kambur og Eystnes, sum báðir royna undir Føroyum, biðið um landing.

Bæði línuskip og trolbátar, sum royna á landleiðini, hava gjørt hampiliga góðar túrar í seinastuni.

# Eingin snelluveiða á Norðhavinum

**Tá snellubátarnir byrjaðu várróðurin á Norðhavinum í næst síðstu viku, bóru teir beinanvegin við fisk, men síðan hevur ikki vignast hjá bátunum norðanfyri**

ÚTRÓÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í seinastu viku fekst lítið burtur úr hjá bátunum, sum liggja klárir til snelluútróður á Norðhavinum. Høgættin roynist illa norðanfyri, og tí var at kalla eingin snelluútróður alla síðstu viku.

Tað byrjaði annars væl hjá bátunum, sum ætlaðu sær at fáa nakað burtur úr snellufiskiskapinum á Norðhavinum í ár.

Í næst síðstu viku vóru fleiri bátar, sum rógva út av Eiði, á snelluveiði norðanfyri, og hjá summum eydnaðist onkur dagur heilt væl.

Á Bátafiski á Eiði siga tey, at báturin, sum gjørdi besta útróðrardagin, fekk eini 2400 pund, meðan aðrir høvdu 2.000 pund, og onkur hevði eisini eini 1700 pund.

- Fleiri bátar liggja klárir til snelluútróður á Eiði, og nú vóna menn, at veðrið fer at halda sær, so teir sleppa útaftur.

Bátar eru komnir heilt úr Suðuroy norður til Eiðis at liggja klárir til várróður.

Á Eiði halda tey,, at góði fiskiskapurin, sum tók seg upp beinanvegin, minkaði aftur. Tað var ikki bara veðrið, sum tarnaði bátunum.

- Talið av snellubátum, sum stevndu út á Norðhavið í næst síðstu viku, var stórt, og kanska var hetta ein orsøk til, at fiskurin spjaddi seg og var verri at fáast við.

Á Eiði vita tey annars at siga, at tveir útróðrarbátar, sum royna við línu, eru farnir til útróðrar í morgun.

- Í næst síðstu viku vóru menn vestanfyri við línu, og tá fekk onkur bátur upp í eini 10.000 pund á setuna, siga tey á Bátafiski á Eiði.